gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Herfølge nærkast strikuni

**Eftir sannførandi sigurin á botnliðnum er lagið gott, og tað tykist sum Jákup Mikkelsen og hava fingið mót av nýggjum**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*



*Eftir trygga sigurin á botnliðnum, HFK, kunnu Jákup og teir nú anda heldur lættari eina tíð, men enn er langt eftir á mál tykist venjarin, John Faxe Jensen, at rópa*

Fyri einum ári síðani var tað so at siga gerandiskostur, at Herfølge spælarar vórðu kosnir til vikuliðini hjá donsku fjølmiðlunum. Hetta kappingarárið hevur úrtøkan hjá meistaraliðnum verið sera soltin, og tí hevur tað ikki verið nakað at sagt til, at tað hevur verið langt ímillum úttøkurnar til vikuliðini.

Sunnudagin hevði Herfølge vitjan av botnliðnum HFK Sønderjylland. Eingin ivi var um, hvør var omaná, og hvør var undir. Herfølge, sum alt kappingarárið frammanundan bara hevði skorað tólv mál á heimavølli, vann sannførandi 3-0, og avrikið hevði við sær, at tríggir av liðfeløgunum komu á vikuliðið: Tommu Schram á miðvøllinum, og málskjúttarnir Dennis Conteh, sum stutt fyri hálvleik við hálvfluktara úr 30 metra fjarstøðu varð sagdur at hava skorað besta málið í Herfølge í fleiri ár, og Chris Hermansen, ið hevur havt ilt við at finna málsókna spælið, sum hann sýndi fyri nøkrum áruym síðani, men sum hesa ferð skoraði longu í 2. minutti.

Jákup Mikkelsen helt tætt ímillum stólparnar hjá Herfølge. Hann man sjáldan í hesum kappingarárinum hava havt so lítlar møguleikar at vísa, hvør dugur er í honum, sum hann hevði hesa ferð. Serliga í 2. hálvleiki var yvirvágin hjá heimaliðnum sera eyðsýnd.

## Meiri fólk

John Faxe Jensen, Herfølge venjarin, sum hesa ferð var á vøllinum í 80 minuttir, hevur alla tíðina tvíhildið um, at liðið hjá honum fór at hava møguleika at sleppa undan niðurflytingini. Sunnukvøldið var Herfølge framvegis niðanfyri niðurflytingar strikuna, men nú er tað bara málmunurin, sum ger av, at AB er omanfyri og Herfølge niðanfyri strikuna.

John Faxe Jensen og hansara menn kenna tað lýsna eitt sindur, tí onkrir av spælarunum, ið leingi hava verið uttanfyri við skaða, eru klárir aftur. Tá Herfølge 20. august í fjør spældi innleiðandi í Europa Cup fyri meistaralið í Glasgow, varð stóri og vandamikli álopsmaðurin, Kenneth Jensen, skaddur. Sunnudagin spældi hann fyri fyrstu ferð aftur, síðani hann var skaddur. Hann var á vøllinum í 20 minuttir, og Lars Jacobsen, sum eisini hevur verið skaddur í langa tíð, var við síðstu tíggju minuttirnar.

Eitt nýtt umfar í superliguni er á skránni aftur skírisdag. Tá fær Herfølge vitjan av Viborg. Annan páskadag skal Herfølge spæla í Brøndby.

## Striltið hjá AB

Einki felag í Danmark hevur so nógvar spælarar í landsliðshópinum hjá Morten Olsen, sum AB hevur. Men hóast fimm av spælarunum hoyra til teir, ið Morten Olsen hevur í brutto hópinum hjá sær, so er AB framvegis í stórum niðurflytingarvanda.

Sunnudagin vóru teir í Viborg. Úrslitið var 0-0, og tað vóru teir í AB ivaleyst fegnir um. Hjá hvørgum partinum var avrikið nakað at reypa av. At Viborg ikki megnaði at vinna á botnliðnum hevur við sær, at teir neyvan hava stórvegis møguleika at blanda seg í kappingina um meistaraheitið.

## AGF í hopla

Í Herfølge hava teir alt kappingarárið havt eyguni eftir AB og AGF. Hjá felagnum í Århus hevur eingin endi verið á ólukkunum, sum hava skolað omanyvir teir. Men tann síðsta vikan hevur givið teimum so mikið av sjálvsáliti, at teir siga seg rokna við, at niðurflytingin, sum eftir 5-1 tapið í Aalborg næstsíðsta sunnudag kendist rættuliga viðkomandi, nú fer at kámast.

Í farnu viku eydnaðist tað hjá AGF at sleppa undan hóttandi húsagangi, so fingu teir ein høvuðsstuðul. Seinni í vikuni varð kunngjørt, at fyrrverandi AGF maðurin, Marc Rieper, sum í mong ár var verjuálit á landsliðnum, men sum nú er fótbóltsinvalidur, skal verða hjálparvenjari.

Alt hetta hevði við sær, at fótbóltslagið í jyska høvuðsstaðnum batnaði so mikið, at 5.253 leitaðu sær út í várveðrið at hyggja at AGF. Og á vøllinum gekk upp á stás. OB varð sent til hús við 4-1 tapi. AGF hevði eina rúgvu av møguleikum, og sigurin kundi havt verið uppaftur størri, um fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson í FCK, Karim Zasa, ikki hevði staðið seg so væl í OB málinum.

Heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað hjá okkara manni í OB, Johan B. Hansen, at koma á vøllin. Hvørki ímillum teir fyrstu ellivu ella sum skiftisspælari.

Hósdagin fær OB vitjan av Brøndby, og 2. páskadag skal OB spæla í Aalborg.

# Tað gerst alsamt tættari í toppinum

**Fyri FCK var tað av stórum týdningi, at oddaliðið, Silkeborg, ikki megnaði at vinna toppdystin í Brøndby**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Tað gerst alt tættari í toppinum í donsku superliguni. Í gjárkvøldið spældi felagið hjá Toda Jónsson, FCK, í Lyngby. Todi Jónsson er framvegis uttanfyri við skaðanum, sum hann fekk í Luksemburg. Í gjárkvøldið skuldi hann á gamla heimavøllin hjá sær at fylgja við avrikinum hjá liðfeløgunum. Um tað eydnaðist FCK at fáa øll trý stigini, so vóru teir bara eitt stig aftanfyri oddaliðið Silkeborg. Men uppgávan var ikki bara sum at siga tað, tí Lyngby hevur staðið seg sera væl.

At FCK í gjárkvøldið av álvara hevði møguleika at blanda seg í oddastríðið komst m. a. av, at Brøndby sunnudagin vann 1-0 á heimavølli ímóti oddaliðnum úr Silkeborg. Hetta var fyrsti heimasigurin hjá Brøndby í ár. Frammanundan høvdu teir tapt bæði ímóti OB og FCK. Tapið hjá Silkeborg var bara tað triðja í hesum kappingarárinum. Nú eru 22 av teimum 33 umførunum løgd afturum.

Størsta áskoðaratalið sunnudagin var í Brøndby. Fleiri enn trettan túsund sóu heimaliðið vera nógv meiri sannførandi enn gestirnir. Men tað gekk illa at fáa mál, m. a. tí at eykamálverjin á landsliðnum, Peter Kjær, stóð seg so sera væl. Einasta málið kom í 56. minutti, og tað var eitt sjálvmál.

Skírisdag skal Brøndby spæla í Odense ímóti OB, og 2. páskadag fáa teir vitjan av Jákupi Mikkelsen og Herfølge. Hósdagin skal Silkeborg spæla á útivølli ímóti FCM, og mánadagin hava teir heimavøll ímóti grannunum úr AGF.

## Fleiri í stríðnum

Umframt Silkeborg og Brøndby eru tað eisni onnur feløg, sum saman við FCK kappast um DM. Eitt av hesum liðunum er samansetta liðið úr Ikast og Herning, FCM. Við tepra sigrinum á heimavølli ímóti AaB løgdu teir seg undir liðina á Brøndby.

AaB vísti meiri sannførandi avrik, men teir kendu ikki sína vitjunartíð. Einasta málið kom, tá tað bara vóru tveir minuttir eftir. Tað var innskifti Mogens Laursen, sum skoraði. At AaB tapti hevur við sær, at teir orduliga eru dotnir burtur ímillum í toppstríðnum.

Í morgin venda vit aftur til, hvussu tað hilnaðist hjá GCK í Lyngby. Hósdagin fær FCK vitjan av AaB, og mánadagin skal FCK spæla á útivølli ímóti botnliðnum í Haderslev, sum nú eitur HFK Sønderjylland.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Helt seg vera givna

**Eftir at hon í fjør hevði frí frá hondbóltinum, fann Alis Høghamar í summar harpiksið framaftur, og hetta hevur hon onga orsøk havt til at angra**

FØROYAMEISTARI
*Jákup Mørk*

Eftir at hava spælt hondbólt á hægsta støðið her heima í eini 20 ár, var leygardagurin fyrsta ferðin, at Alis Høghamar kundi rópa seg Føroaymeistara. Tí var tað sjálvandi ein fegin Alis, sum vit fingu orðið á, tá alt endiliga var liðugt, og tað var greitt, at VÍF fór ígjøgnum kappingina við fullum stigatali.

- Eg hevði faktist ongan tíð vunnið nakað sum helst undan hesum kappingarárinum, og nú eg havi fingið at kalla í bæði posa og sekk, kann eg ikki annað enn vera sera væl nægd.

## Liðið hevur riggað

Spurd, hvat hon heldur er orsøkin til, at VÍF ikki bara er føroyameistari, men hevur skúgva alla mótstøðu til viks hetta árið, heldur hon størstu orsøkina vera, at tær hava rigga væl saman.

- Vit hav spælt sum eitt lið, og vant bæði væl og nógv. Vit byrjaðu longu í juni mánaði við venjingini, og síðani hava vit vant alla tíðina fram til hóskvøldið, tá vit høvdu seinastu venjingina.



*Alis gleðir seg nú til í minsta lagi fýra vikur við hvíld, men so verður farið undir til komandi Europa-Cup kappingina*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spurd, um hon so ætlar sær at hava frí í nakrar vikur –ella kanska mánaðir – nú kappingarárið er av, sigur hon, at tað skulu í øllum førum verða fýra vikur við hvíld.

Ein somikið stuttur steðgur boðar frá, at Europa-Cup luttøka helst stendur á skránni, og Alis sigur eisini, at hetta er ein avbjóðing, sum hon gleðir seg til at royna.

- Vit hava tosað um at fara í Europa-Cup kappingina fyri steypavinnarar. Vit hava sjálvandi møguleikan at royna okkum í kappingini fyri meistarar, men tað er kanska betri hóskandi at taka lut í teirri fyri steypavinnarar.

## Helt seg vera givna

Hóast hon hevur drúgvar royndir í føroyskum hondbólti, so er hetta fyrsta árið, at Alis roynir seg hjá VÍF. Spurd, hvussu tað kom í lag, at hon nú brádliga var at síggja í Vestmanna, svarar Alis, hetta var eitt høvi at royna nakað nýtt.

- Tær ringdu undan kappingini og spurdu, um eg hevði hug at spæla. Sjálv hevði eg ikki roknað við, at eg yvir høvur fór at koma í gongd aftur. Eg hevði jú havt frí í eitt ár. Eg helt tó, at hetta var vert at royna – ikki minst tí Sóley eisini hevði játtað at spælt við.

- Nú kann eg so ikki siga annað enn, at eg havi kent meg sera væl her í Vestmanna. Vit hava verið sera væl móttiknar, og eg havi ikki í eitt sekund angra, at eg játtaði at spæla við teimum. Hevði tað ikki verið av berum huga, so hevði so alt ikki tíma at ferðast aftur og fram somikið ofta, sigur Alis at enda.

# Kom heim til gullið

**Oddasessurin hjá VÍF var ein av høvuðsorsøkunum til, at Jacklin Durhuus í vetur gjørdi av at koma heim, eftir at hon í hálvt ár hevði roynt seg hjá Slagelse í Danmark**

FØROYAMEISTARI
*Jákup Mørk*

Tá kappingarárið byrjaði, noyddust tær úr Vestmanna at klára seg uttan tann av egnu leikarunum, sum helst hevur havt størstan týdning á liðnum. Jacklin Durhuus royndi seg ístaðin undir leiðslu av Anju Andersen í Slagelse, men um jóltíðir fræ ttist tó, at hon nú aftur hevði valt at seta búgv heima í Føroyum.

## Gullið vigaði nógv

Eftir at hon leygardagin hevði ognað sær næsta gullmerkið á árinum, spurdu vit Jacklin, um gullmerkið, sum hon nú hevði um hálsin, var ein av orsøkunum til, at hon tá setti kós heimaftur.

- Sjálvandi. Nei, tað vóru eisini aðrar orsøkir til, at eg fór úr Slagelse. Eg treivst ikki so væl niðri, men hetta var so avgjørt við til at skumpa undir avgerðina hjá mær.



*Jacklin er á ongan hátt kedd um, at hon ikki longur tykist at hava sama lyklaleiklut á liðnum hjá VÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spurd, um hon hevði roknað við gullmerkjum í bæði lands- og steypakapping, tá hon á jólum kom heim, sigur Jacklin, at tað hevði hon ikki roknað við.

- Eg kann ikki siga, at eg roknaði við tveimum heiðursmerkjum, men eg hevði í øllum førum vónað, at tað fór at eydnast okkum at vinna føroyameistaraheitið. Eg hevði bara hoyrt, hvussu væl alt gekk, men eg hevði ongan tíð sæð liðið spælt, so eg visti ikki rættiliga, hvat eg skuldi rokna við. Hinvegin visti eg av, at hetta helst var besta liðið, sum felagið hevur havt, og tí hevði eg avgjørt hug at gerast ein partur av.

## Torført at koma aftur

Tað tók tó sína tíð, áðrenn Jacklin av álvara megnaði at bíta seg fasta aftur á liðið. Eitt sindur merkisvert, tá leiklutur hennara í fjør verður havdur í huga, men sjálv tykist hon tó ikki at hava so nógv ímóti hesum. Hon vísir í fyrstu syftu á, at hinar sjálvandi vóru samanspældar, tá hon kom heim, og tí hevði hon ikki roknað við at sloppið beint inn á liðið.

- Tær høvdu jú vant í einar tríggjar fýra mánaðir, áðrenn eg kom, og tá fleiri av leikarunum vóru nýggjar, so er tað nóg so torført at koma inn á eitt sovorðið lið. Ikki minst, tá tær vóru somikið fáar, tí tá gerst kunnleikin millum einstøku spælararnar enn størri. Eg haldi eisini, at Daniel ikki hevur vilja brúkt meg so nógv, nú tað kortini hevur koyrt so væl hjá hinum.

Tá vit so at enda spurdur Jacklin, hvørt hon hevur ætlanir um at verða á liðnum, tá farið verður í gongd við komandi kappingarár, er hon ikki í íva.

- Tað ætli eg mær so 100% sikkurt, sigur ein smílandi føroyameistari

# Armarnir komu ikki niður

**Tað heldur venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, vera størstu einstøku orsøkina til, at klaksvíksgenturnar í ár máttu lata sær lynda við silvurmerkjunum**

SILVURVINNARI
*Jákup Mørk*

Tað er sjálvsagt ikki tann sama gleðin, tá tú sum leikari ella venjari vinnur silvurmerki, eftir at tú árið fyri hevur átt gullmerkini. Hetta er tó støðan hjá frákoyrdu meistarunum úr Stjørnuni, og eftir dystin spurdu vit venjaran, Rógva Nielsen, hvør orsøkin til hetta er.

- Orsøkin er helst tann, at vit ikki komu eins skjótt í gongd í ár, sum vit gjørdu í fjør. Tað at allur hópurin ikki hevði fingið armarnir nóg skjótt niður.

- Tað er helst týdningarmiklasta orsøkin, men harumframt høvdu vit eisini nakað av órógva á liðnum, akkurát meðan mest stóð á. Tað var júst tá, at vit høvdu tørv á arbeiðsfriði, so hetta hevði sjálvandi eisini sítt at siga.

- Tú fært meg ikki til at siga, at VÍF hevur ein sterkari hóp enn vit, men hinvegin er einki at ivast í, at tær hava eitt lið, sum er nógv sterkari, enn tað, sum tær høvdu í fjør.

## Missurin av Andrianu

Skal nøkur einstøk hending við leikarum takast fram, so mundi tað helst vera ein stórur missur, at Andriana Milodanovic varð skadd tíðliga í heyst, og Rógvi ásannar eisini, at hetta var ein sera stórur missur hjá teimum.

- Breiddin í spælinum hjá okkum og ikki minst kontraparturin riggaði ikki eins væl, tá hon ikki var við, og tað er ikki fyrr enn nú, at vit aftur hava fingið hetta at rigga.

Maður kemur tó í mans stað, verður sagt. Soleiðis tóktist eisini at vera í Klaksvík, tá litaviski stórskjúttin hjá Sóljuni, Simona Dziugyte, kom til felagið í jólasteðginum. Tað tók tó sína tíð, áðrenn hon av álvara fór at gera um seg, men Rógvi tykist tó ikki at vera so harmur um hetta, sum mann kanska kundi hildið.

- Simona var fyrst og fremst ein íløga, sum varð gjørd við atliti til komandi ár. Hon kom kanska nakað seinni ígongd, enn vit høvdu vónað, men hon er so komin íongd. Tað hevur verið sjónligt seinastu dystirnar og ikki minst í dag, so hon verður so avgjørt ein stórur styrkur framyvir.

## Einki um komandi ár

Tá tosið fellur inn á framtíðina, spyrja vit at enda Rógva, um hann longu nú hevur eina hóming av, hvussu fer at standa til við fólki hjá Stjørnuni komandi ár, men tað sigur hann seg als ikki hava.

- Eg fái einki sum helst svara viðvíkjandi komandi kappingarárið, sigur Rógvi Nielsen, áðrenn hann endar samrøðuna við at nýta høvi til at VÍF hjartaliga tillukku við FM-heitinum, sum hann sigur skal vera teimum væl unt.



*Rógvi Nielsen hevði vónað, at Simona Dziugyte kom nakað fyrr ígongd, men leggur tó afturat, at hon varð fingin til felagið við atliti til komandi kappingarár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*